J.nr.: F.K. 00-04-
Dato: 01. juni 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# F U N D A R F R Á S Ø G N

## frá býráðsfundi nr. 07/2006

Ár 2006 tann 01. juni kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 26. mei 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Gordon M. petersen
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen
Petur Abrahamsen
Signar á Brúnni og Dánjal Vang eru staddir uttanlands. Dánjal Vang hevur heitt á borgarstjóran um at innkalla varalimin Gordon M. Petersen, og hevur borgarstjórin gjørt eftir áheitanini.

Býráðið samtykti einmælt, at Gordon M. Petersen tekur sæti fyri Dánjal Vang á fundinum.

Jann Tofetgaard var ikki á fundi.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 28/2006.**

**Eykajáttan í sambandi við normeran av starvi sum sosialráðgevi á sosialu deildini.**

Sosiala nevndin hjá Fuglafjarðar kommunu hevur á fundi tann 7. apríl 2006 samtykt at seta ein sosialráðgeva í starv á sosialu deildini frá 01. september 2006 at rokna. Nevndin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við málinum og biðja býráðið um eina eykajáttan til endamálið.

Fyri 4 mánaðar kostar starvið umleið kr. 92.000,00, sí hjáløgdu lønartalvu.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 26. apríl 2006, og tekur nevndin einmælt undir við tilmælinum frá sosialu nevndini, somuleiðis sum mælt verður til, at peningur til endamálið verður fingin til vega av ætlaða rakstraravlopinum á fíggjarætlanini fyri 2006, sum er kr. 92.565,00.

Eykajáttanin kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan við kr. 92.000,00, og kemur at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2006 við nevndu upphædd.

Tá talan er um eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað

Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi 04. mei 2006, og varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá soaialu nevndini og fíggjarnevndini um setan av sosialráðgeva á sosialu deildini tann 01. september 2006.

Somuleiðis varð samtykt at beina málið um eykajáttanina til lønarútreiðslur til 2. viðgerð á býráðsfundinum 01. juni 2006. (9-0).

**Avgerð:**

Eykajáttanin upp á kr. 92.000,00 til lønarútreiðslur til sosialráðgeva varð endaliga samtykt við 2, viðgerð. (7 atkv. fyri 0 atkv. ímóti).

**<u>Mál nr. 29/2006.</u>**

**Mál viðvíkjandi samsýningum til nevndarlimir og nevndarformenn og broytan av kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu fyrisitingini, dagfest 21. mei 2006 um fastar samsýningar til nevndarlimir og nevndarformenn í føstu nevndum býráðsins, teknisku nevndini, havnanevndini, sosialu nevndini og mentamálanevndini.

Sambært skrivinum, sum byggir á kunngerð nr. 14 frá 15. mars 2006 um samsýningar vm. sambært kommunustýrislógini verður árligu samsýningarnar tilsamans kr. 178.176,00 útgreinað soleiðis, at samsýningarnar til nevndarlimir verður kr. 111.360,00 og til nevndarlimirnar kr. 178.176,00.

Henda upphædd er áleið tann sama, sum útgoldin varð í 2005, har nevndarlimirnir vórðu avroknaðir við vanligari fundarsamsýning.

Fyrisitingin mælir fíggjarnevndini til at heita á býráðið um at seta skipanina um fastar samsýningar til nevndarlimir og nevndarformenn í føstu nevndunum í gildi frá 1. juli 2006 at rokna, og at avrokningin fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni 2006 verður framd sum undanfarin ár fyri hvønn nevndarfundin sær eftir § 2, stk. 2, og at henda skipan fer úr gildi samstundis sum nýggja tekur við.

Somuleiðis verður neyðugt at broyta § 33, stk. 10 og 11 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, sum fastar samsýningar til nevndarlimir og nevndarformenn vm.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 26. mei 2006, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá fyrisitingini um, at fastar árligar samsýningar til nevndarformenn og nevndarlimir verða settar í gildi frá 1. juli 2006 at rokna, og at kommunustýrisskipanin § 33, 10. og 11. petti verður broytt til § 34, 10. og 11. petti.

Somuleiðis mælir nevndin býráðnum til at broyta § 20 í kommunuskipanini soleiðis:

***Hesar føstu nevndir umframt fíggjarnevndina skulu verða valdar:***

1. Tekniska nevndin

2. Mentamálanevndin
3. Havnanevndin
4. Sosiala nevndin

Ráðgevandi Heilsu- og umhvørvisnevndin og Hellunevndin verða fluttar frá § 20, 5 og 6, til 6. part "Aðrar nevndir" undir ávikavist § 28 og 29, meðan nýggj § 33 verður sett inn við heitinum "Ferðslunevndin"

Vísandi til 8. part "Broytingar í stýrisskipanini o.a. § 34, skulu broytingar verða viðgjørdar á tveimum býráðsfundum við minst 14 daga millumbili.

**Avgerð:**

Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt, somuleiðis sum málið um broytan av kommunustýrissamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu varð beind til 2. viðgerð á býráðsfundi tann 29. mei 2006. (6 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

## Mál nr. 30/2006

**Umsókn frá Beggu og Búgva Vang um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211h sunnan fyri Bakkageilina.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Beggu og Búgva Vang, dagfest 22. mei 2006 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211h sunnan fyri Bakkageilina í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 26. mei 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst 1 vindeyga, sum kann verða latið upp við fríum opi, sum er minst 50 cm. Í breidd og 60 cm. Høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.
2. Parkeringspláss til 2 bilar skal vera inni á stykkinum, og skal hetta vera gjørt, áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil. Veggurin móti vegnum Bjarnarvegur verður gjørdur í samráð við teknisku deildina.
3. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar, áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða sambært veðleiðing frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni og settur niður sambært veðleiðing um rottangaskipan. Eisini skal rundskriv, dagfest 02. juli 1998 frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni um nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
4. Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deild, og kloakkirnar skulu verða sýnaðar av teknisku deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
5. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.
6. Útgrevstrar- og planeringsarbeiðið skal verða gjørt soleiðis, at fortovskantar og vegur ikki verða skaddir, og einki tilfar frá útgrevstrinum skal verða sløtt eftir vegnum og á landsvegin, har moldin verður løgd á Kambsdali. Um hetta kemur fyri, skal hetta verða tikið upp beinanvegin, og møguligur skaðar verða umvældir.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. ( 7 atkv. fyri og 0 atkv. ímóti).

**Mál nr. 31/2006.**

**Umsókn frá Páll Laksáfoss um byggiloyvi til aftratbygging.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Páll Laksáfoss, dagfest 08. november 2005 um byggiloyvi til minni uppíbygging í sethús síni á matr. nr. 662a við Gjógvaráveg.

Marknaumskipan er farin fram, har Páll hevur fingið 3 m2 frá matr. nr. 661.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 26. mei 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bryggers og dur eystureftir sambært fyriliggjandi umsókn og tekningar.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (7 atkv. fyri og 0 atkv. ímóti).

**Mál nr. 32/2006.**

**Umsókn frá Ingja Andreasen um byggiloyvi til garð og bilhús á matr. nr. 564.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Ingja Andreasen, dagfest 26. februar 2006, móttikin 22. mei 2006 um byggiloyvi til garð og leingjan av bilhúsi á matr. nr. 564.

Viðlagdar eru tekningar og grannaloyvi frá Sámal Andrew Hansen, dagfest 23. mei 2006.

Talan er um bygging á matr. nr. 564, sum í vídd er 459 m2 við ábygdum sethúsum og bilhúsi. Verandi nettonýtingarstig er 0,46. Bilhús upp á 35 m2 verður ikki roknað upp í nettonýtingarstigið.

Um bygt verður sambært fyriliggjandi umsókn verður bilhúsið 77 m2. Verandi bilhús er 47 m2. Verður bygt sambært fyriliggjandi umsókn verður nettonýtingarstigið 0,52.

Talan er um bygging á øki, sum sambært byggisamtyktina er sethúsaøki, og har mest loyvda nettonýtingarstig er 0,3.

Sambært byggisamtyktini eru eisini ásetingar fyri bygging á sethúsaøki, har bilhús, skúrar, hjallar og úthús kunnu verða bygd nærri grannamarki, tá ið hesar treytir eru loknar:
"Longdin á bygninginum móti grannamarki má ikki verða størri enn 8 metrar. Vendir bygningurin móti 2 markum má longra síðan í mesta lagi verða 8 metrar og tann styttra 4,5 metrar".

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 26. mei 2006.

Vísandi til ásetingarnar í byggisamtyktini, har mest loyvda nettonýtingarstig á sethúsaøki er 0,3, og tá nettonýtingarstigið frammanundan er oman fyri mest loyvda, mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi ikki verður givið.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (7 atkv. fyri og 0 atkv. ímóti).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.15.

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Jón Nolsøe Olsen

Torfríður Abrahamsen

Petur Abrahamsen

Gordon M. Petersen

Sigurð S. Simonsen